# Leiðbeining til § 1 í barnaverndarlógini

## Barnavernd – definitiónir og flokkingar

*Høvundur: Dr. Freydís Freysteinsdóttir, PhD í Social Work, lektari við Háskólinn í Reykjavík.*

Dagført 16.11.2022

## Innihald

1. partur: Barnið sum offur ..... 2
Vanrøkt ..... 2
1 Likamlig vanrøkt ..... 2
2 Vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit ..... 4
3 Vanrøkt í sambandi við skúlagongd ..... 5
4 Kenslulig/sálarlig vanrøkt ..... 5
Harðskapur ..... 6
1 Kensluligur/sálarligur harðskapur ..... 6
2 Likamligur harðskapur ..... 7
3 Kynsligur ágangur ..... 8
Heilsa ella lív hjá óføddum barni í vanda ..... 9
1 Rúsdrekka ella onnur rúsevni í likami hjá barni ..... 9
2 Heilsan hjá barninum í móðurlívi er í vanda orsakað av føðslutroti ..... 9
3 Heilsan hjá barni í móðurlívi er í vanda orsakað av, at maki bukar mammuna ..... 10
2. partur: Hættislig atferð hjá børnum ..... 10
1 Barn rúsar seg ..... 10
2 Barn setur egna heilsu og menning í vanda ..... 10
3 Misgerðir hjá barni ..... 10
4 Barn fremur harðskap ella kynsligan ágang móti øðrum barni ella vaksnum persóni ..... 10
5 Barn hevur trupulleikar í skúlanum og forsømir hann ..... 10

# 1. partur: Barnið sum offur

Skeivleikar, sum gera um seg í barnaumsorgan og uppaling kunnu verða býttir í tvey: harðskapur og vanrøkt. Við harðskap verður meint við *gjørda* gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menningina hjá barninum. Við vanrøkt verður meint við *ógjørda* gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menningina hjá barninum.

## Vanrøkt

Vanrøkt kann verða býtt í hesar flokkar:

- Likamlig vanrøkt
- Vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit
- Vanrøkt í sambandi við skúlagongd
- Kenslulig/sálarlig vanrøkt

## 1 Likamlig vanrøkt

Foreldur forsøma at taka sær av likamliga tørvinum hjá barninum.

- Trivnaðarólag
- Vánaligir matvanar
- Vánalig klæði
- Vánaligt reinføri
- Vánaligur bústaður
- Vánalig heilsutænasta

### *1.1 Trivnaðarólag (Failure to thrive)*

Trivnaðarólag vísir seg sum álvarslig heilsustøða hjá ikki ársgomlum børnum. Eyðkenni eru serliga, at barnið ikki tyngist ella veksur, sum tað eigur, sammett við onnur børn; harumframt er rørslumenningin langt undir miðal fyri vanlig børn (undir fimm prosent). Umleið 10 % av tilburðunum hava lívfrøðiliga orsøk, eitt nú álvarsligt nýra-, hjarta- ella heilabrek. Í øllum øðrum førum er talan um avleiðingar av, at álvarsligt ólag er komið á viðurskiftini millum foreldur og barn, sum vísir seg í álvarsligari likamligari og kensluligari vanrøkt av barninum. Tað er lækni, ið skal staðfesta trivnaðarólag.

### *1.2 Vánaligir matvanar*

Foreldur hava ikki givið barninum hóskandi mat ella so nógvan mat, sum barninum tørvar til at mennast, og sum heilsa og vælferð hjá barninum krevja. Barnið fær javnan ikki vanligu máltíðirnar ella fær javnan ikki nóg nógvan mat. Dømi um hetta eru:

- Ábendingar um, at eitt barn helst ikki fær nóg mikið at eta, er til dømis, at tað javnan biður grannar um mat.
- Eitt barn fær eftir aldri, búningarstigi og kropsstødd ofta ella javnan ov lítlan ella ikki nóg heilsugóðan mat at eta, og tað hevur annaðhvørt føðslutrot ella ovurfiti við sær. Lækni skal staðfesta føðslutrot ella ovurfiti. Støði er tikið í BMI-talinum 40 hjá børnum (t.e. álvarslig ovurfiti). BMI = vekt í kg/hædd í metrum í øðrum potensi. Dømi: $67/(1,7)^2 = 23,2$.
- Ein tannáringur etur so óregluliga, at tað ávirkar heilsuna og menningina, ella fær ikki nóg mikið at eta.

### *1.3 Vánalig klæði*

Foreldur síggja ikki til, at barnið er ílatið soleiðis, sum gott er fyri heilsuna og trivnaðin. Dømi um hetta eru:

- Klæðini hjá barninum eru ov lítil ella ov trong og til ampa fyri barnið, eitt nú ov smáir skógvar, sum barnið fær ilt í føturnar av.
- Klæðini, barnið gongur í, eru ikki nóg heit eftir veðrinum, og barnið tí ikki nóg væl vart ímóti kulda.
- Tannáringur letur seg ikki í eftir veðrinum ella eftir umstøðunum.

### *1.4 Vánaligt reinføri*

Foreldur síggja ikki til, at barnið er reint og røkt soleiðis, sum gott er fyri heilsu og trivnað. Dømi um vánaligt reinføri eru:

- Barnið fer so sjáldan í bað, at tað luktar.
- Barnið gongur í gravskitnum klæðum.
- Tenninar verða ikki bustaðar regluliga, og barnið hevur skitnar tenn.
- Tannáringur vaskar sær ikki.

### *1.5 Vánaligur bústaður*

Foreldur hava ikki bústað, sum er góður fyri heilsu og trivnað hjá barninum. Hetta vísir seg til dømis soleiðis:

- Eingin bústaður ella tilhald.
- Bústaður, sum ikki er búgvandi í.
- Skitføri, t.d. gamlar matleivdir og órudd flýtur um alt.
- Likamliga trygdin hjá barninum er í vanda, tí til dømis el-innleggingar liggja berar, ella tí at trygdarportur ikki er fyri trappur.
- Ymist vantar, ið krevst til vanligt húsarhald, eitt nú streymur ella hiti.

### *1.6 Vánalig heilsutænasta*

Foreldur síggja ikki til, at barnið fær ta heilsutænastu, tí tørvar. Dømi um tað eru:

- Fakfólk í heilsuverkinum mæla til, at barnið fær ávísa viðgerð, men foreldrini gera einki við tað (her er tó undantikið, um annað fakfólk hevur mælt til okkurt annað, sum ikki er í samsvari við tað, ið hitt fakfólkið hevur mælt til.)
- Fakfólk í heilsuverkinum siga, at eitt barn áhaldandi er sjúkt ella áhaldandi er soleiðis fyri, at tað mest sannlíkt krevur viðgerð. Men viðgerðin verður ikki veitt við tí úrsliti, at barnið er versnað.

Omanfyri nevndu viðurskifti galda eisini ta sálarheilsutænastu, sum barninum tørvar. Dømi um hetta eru:

- Fráboðan frá fakfólki í skúla ella øðrum fakfólki vísir, at mælt hevur verið til at kanna andligu heilsu barnsins, eitt nú vitsevni (intelligens) ella sálarstøðu, orsakað av atburði, uppáhaldum, sum barnið kemur við, ella ytri teknum, sum benda á eyðsýndan og varandi skaða, ið foreldrini ikki hava tikið sær av.

- Fakfólk í sálarheilsutænastuni hevur greinað andligu støðu barnsins og hevur tilskilað viðgerð, t.d. við heilivági, ið foreldrini ikki hava tikið til eftirtektar.

## 2 Vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit

Foreldur hava ikki neyðuga umsjón og eftirlit við barni, og tí er trygdin og vælferðin hjá barninum í vanda. Hetta er galdandi í førum, tá ið barnið ikki er likamliga, andliga, sálarliga, kensluliga ella praktiskt búgvið at verja seg seg sjálvt í viðkomandi umstøðum.

### *2.1 Foreldur ansa ikki nóg væl barni*

Foreldur eru til staðar, men ansa ikki nóg væl eftir barninum, soleiðis at tað kann koma sær í vanda. Foreldrini gáa ikki um hóttandi vanda og taka ikki fullgóð stig til at verja barnið fyri skaða. Dømi um hetta eru:

- Barn verður lagt á skiftiborð og eingin ansar tí, er einsamalt í svimjihyli/heitum potti ella øðrum staði, har lív og heilsa barnsins er í vanda.
- Barn er annaðhvørt ikki bundið nóg væl í bilstóli ella við trygdarbelti eftir aldri barnsins.
- Barnið liggur í barnavogni uttan fyri hús/íbúð, matstovu ella annan stað og grætur uttan at tað hoyrist, og nakar letur við seg koma.

### *2.2 Barn er einsamalt, tó tað ikki hevur aldur ella er búgvið til tað*

Barn, sum ikki er nóg gamalt ella búgvið til tað, er einsamalt, og eingin hyggur til tað eitt nú við hús ella í bili.

### *2.3. Barn er hjá skikkaðum persóni, men longur enn væl er*

Barn verður latið skikkaðum persóni, men verður ikki heintað ásetta tíð, ella eingin avtala er gjørd um, nær komið verður eftir barninum; og tann, sum passar barnið, heldur seg hava passað tað longur enn rímiligt er. Eisini kann talan vera um, at barn óvanliga ofta verður passað hjá ymsum persónum.

### *2.4 Barn er hjá óskikkaðum persóni (tó ikki persóni, sum er harðligur við børn)*

Barnið verður ansað av óskikkaðum persóni. Dømi um tað er t.d. at tann, ið passar barnið, hvørki hevur aldur ella er búgvin til tað, er evnaveikur, ávirkaður av alkoholi ella øðrum rúsevnum ella er álvarsliga sálarsjúkur og tí ikki skikkaður at ansa børnum.

### *2.5 Barn er hjá óskikkaðum einstaklingi, sum møguliga hevur verið harðligur og/ella hevur gjørt seg kynsliga inn á børn*

Foreldur hava fingið fólk at passa barn, hóast tey vita, at viðkomandi hevur ligið ella liggur undir illgruna at hava verið harðligur við ella gjørt seg kynsliga inn á børn (failure to protect). Viðkomandi krevur ikki at vera dømdur fyri brotið, tí torført kann vera at prógva misbrot, og fríkenning staðfestir ikki sakloysi.

### 2.6 *Foreldur siga seg vilja geva barn frá sær kanska med alla*

Foreldur sigur seg ikki vilja eiga barnið ella vil sleppa av tað, og/ella reka tað út heimanífrá. Foreldur setur barn frá sær og ætlar ikki at koma aftur eftir tí (abandon) t.d. úti á víðavangi, á matstovu ella á almennum vesi. Foreldur roynir at taka seg av lívi og er einsamalt um barnið.

### 2.7 *Barn hevur ongan verja, av tí at annað av foreldrunum doyr ella hvørvur/rýmir*

Barn missir verja, av tí at foreldur doyggja, av tí at foreldur missa sjálvræði, ella tí at foreldur verða handtikin ella hvørva av øðrum ávum, soleiðis at foreldrini ikki longur eru før fyri at taka sær av barninum.

### 2.8 *Barn er ikki vart ella enntá í vanda, av tí at lítið skil er á foreldrum, eitt nú av rúsevnisnýtslu*

Barn verður ikki vart ella er í vanda, av tí at lítið skil er á foreldrunum, og óskilið kemur fram á ymsan hátt. Dømi um slíkt eru:

- Barn verður vitni til, at lítið skil er á foreldrum orsakað av rúsdrekka- ella aðrari rúsevnismisnýtslu.
- Barn er í vanda, tí at foreldur koyra við tí í bili ávirkað av rúsdrekka ella øðrum rúsevnum.

### 2.9 *Barninum er loyvt ella tað verður beinleiðis eggjað til at bera seg ólógliga ella ósiðiliga at*

Barninum er loyvt ella tað verður beinleiðis eggjað til at vera við í ólógligum ella ósiðiligum gerðum, t.d. innbroti, stuldri, rúsdrekka- ella aðrari rúsevnisnýtslu ella at selja kynsligar tænastur.

## 3 Vanrøkt í sambandi við skúlagongd

### 3.1 *Barn er ikki innskrivað í skúla ella forsømir skúlan nógv av ólógligum orsøkum*

Barn møtir illa upp í skúlanum og foreldrini gera einki við tað. Barn er ikki innskrivað í skúla ella forsømir skúlan nógv uttan lógliga grund, til dømis tí at barnið ansar eftir yngri systkjum, ella av tí at foreldur ikki vakna nóg tíðliga at senda barnið í skúla rættstundis

### 3.2 *Foreldur hirða ikki um tilboð frá skúla um serundirvísing til barnið*

Skúlin sendir barn til kanningar, av tí at illgruni er um læringartrupulleikar, ella til serundirvísing orsakað av læringartrupulleikum, sum foreldrini ikki leggja lag í.

### *3.3 Barninum vantar í heilum neyðug amboð til skúlaarbeiði, t.d. bøkur, fimleika- og svimjiklæði*

## 4 Kenslulig/sálarlig vanrøkt

### 4.1 *Foreldur misrøkja kensluliga tørvin hjá barninum*

Foreldur eru sein og lítið sinnað at taka sær av kensluliga tørvinum hjá barni sínum, tá ið barnið hevur brúk fyri umsorgan og stuðli, eitt nú tá ið pinkubarn grætur, ella tá ið barn hevur brúk fyri

stuðli frá foreldrum orsakað av smeiti, ið tað fær uttanífrá. Natúrliga tilknýtið millum foreldur og barn tykist vera millum lítið og einki.

### *4.2 Foreldur stuðla ikki nóg væl upp undir sálarligu menning barnsins*

Foreldur stuðla ikki nóg væl upp undir sálarligu menning barnsins. Til dømis forsøma foreldur at læra barnið, tey látast sum tey hvørki hoyra ella síggja barnið, barnið verður at kalla ikki eggjað til at vera sjálvstøðugt, men verður í staðin so nógv vart, at tað ávirkar menningina.

### *4.3 Foreldur misrøkja sosialu menning barnsins*

Foreldur stuðla ikki upp undir sosialu menning barnsins, men avbyrgja familjuna sosialt ella órógva royndirnar hjá barninum at fáa vinaløg við javnaldrar at rigga.

### *4.4 Foreldur seta ikki barninum rímilig mørk og leggja ikki í at uppala barnið (discipline)*

Foreldur seta ikki barninum rímilig mørk og leggja ikki á at uppala barnið. Hetta hevur við sær, at barnið fær ávísar atferðartrupulleikar, illa gongst í skúlanum, og tað hevur ilt við at klára seg sosialt.

# Harðskapur

Harðskapur kann verða býttur sundur í hesar flokkar:

- Kensluligur/sálarligur harðskapur
- Likamligur harðskapur
- Kynsligur ágangur

## 1 Kensluligur/sálarligur harðskapur

### *1.1 Foreldur hava støðugt neiligan hugburð og neiligar kenslur mótvegis barninum*

Foreldur fáa sær til vana at bera seg ómenniskjansliga og niðrandi at móti barni. Dømi um slíkt er:

- Foreldur koma alsamt við viðmerkingum um eginleikar barnsins, eitt nú útsjónd og lyndi
- Foreldur finnast alsamt at tí, sum barnið ger, t.d. í sambandi við skúlating og húsarbeiði
- Foreldur brúka neiliga lødd orð um barnið, eitt nú býttlingur, neyt, apukattur o.s.fr.
- Foreldur senda barninum elektronisk boð, t.d. SMS-boð, ið annaðhvørt mugu haldast at vera andligur harðskapur ella kynsligur ágangur

### *1.2 Foreldur seta barninum órímilig krøv í mun til aldur og búningarstig barnsins*

Foreldur seta barninum ov stór krøv í mun til aldur og búningarstig, t.d. at barnið letur seg í sjálvt, áðrenn tað eigur at klára tað við ongari hjálp.

### *1.3 Foreldur skoða ikki barnið sum sjálvstøðugan einstakling, men ábyrgja barn fyri sín egna kensluliga tørv (role reversal)*

Foreldur virða ikki barn sítt sum sjálvstøðugan einstakling, men heldur sum eina leinging av sær sjálvum. Barnið verður brúkt til at nøkta sálarligan/kensluligan ella kropsligan tørv hjá foreldrum, og leiklutirnir verða vendir við (role reversal), t.e. barnið tekur sær av til dømis sálarliga tørvinum hjá foreldrunum, heldur enn (av sálarliga tørvi barnsins.

### *1.4 Barn verður vitni til harðskap millum foreldur*

Barn verður vitni til harðskap millum onnur, eitt nú likamligan ella kynsligan harðskap millum foreldur, foreldur mótvegis systkjum, millum systkin hjá barninum ella millum barn/tannáring og foreldur.

## 2 Likamligur harðskapur

Likamligur harðskapur er, tá ið børn við vilja verða skadd. Í slíkum førum er umráðandi at kanna, hvussu frágreiðingarnar hjá barni og foreldrum samsvara, hvussu skaðin hendi. Dømi um likamligan harðskap eru at:

- Sláa barn við flatari hond
- Geva barni nevan
- Sparka barn
- Kasta lut eftir barni
- Brenna barn, eitt nú við at koyra hond ella fót í kókandi vatn ella trýsta eina gløðandi sigarett í húðini á barninum
- Binda barn soleiðis at tað ikki sleppur leyst aftur
- Rista pinkubarn ella sláa tað ímóti veggi

Likamligur harðskapur kann eisini vera óbeinleiðis. Dømi um tað eru:

- Barninum verður blandað eitur, barnið hevur fingið vandamiklan heilivág, sum lækni ikki hevur útskrivað, hevur fingið spiltan mat ella verið noytt at eta skarn ella annað, sum kann ætlast at skaða barnið ella vera hættisligt fyri tað.
- Foreldur spinna upp sjúkueyðkenni hjá barni, fara við barninum til fleiri læknar at fáa heilivág til tað ella viðgerð, hóast barnið als ikki er sjúkt (Münchhausen syndrome by proxy).

Dømi um sjónligar løstir, sum barn kann fáa orsakað av harðskapi, eru t.d.:

- Blá merki
- Bløðrur orsakað av bruna
- Eygnaskaðar, til dømis losnað nethinna
- Roði
- Sár
- Brunasár
- Rípur á húðini, t.d. tí at barnið hevur verið sligið við reim
- Arr eftir skaðar

Dømi um løstir, sum ikki altíð eru sjónligir, men sum fakfólk í heilsuverkinum hevur staðfest hjá barni (listin er ikki fullfíggjaður):

- Heilaskaðar
- Løstir á lívgøgn orsakað av miðvísari eitran
- Avskeplan
- Eygnaskaðar
- Ábendingar um, at roynt hevur verið at kvala barn
- Brák á beinum
- Innanløstir í búk- og bróstrúmi
- Annar skaði á miðnervaskipanina
- Brostin ljóðhinna

Mynstur av eyðkennum hjá barni, sum hevur verið rist ella kastað móti onkrum (shaken baby syndrome):

- Keiktur økil
- Áhaldandi bløðing ella blóðbløðra

Tá ið illgruni er um skaða av slíkum slagi, er neyðugt at fara til lækna við barninum og fáa fakfólk í heilsuverkinum nágreiniliga at lýsa løstin og meta um atvoldirnar til skaðarnar.

## 3 Kynsligur ágangur

Kynsligur ágangur ímóti barni er:

- Kynsligur atburður mótvegis barni ella saman við barni yngri enn 15 ár við ella uttan samtykki frá barninum
- Kynsligur atburður mótvegis barni ella saman við barni 15 ár ella eldri uttan samtykki frá barninum.

Viðurskifti í sambandi við kynsligan ágang, sum serliga ávirka avleiðingarnar fyri barnið eru:

1) Hvussu álvarsligur ágangurin er (hvussu langt er farið)
2) Hvussu nær knýtt/ur viðkomandi er tí, ið fremur ágangin (t.d. er viðkomandi partur av húskinum ella ikki)
3) Tíðarskeiðið, sum ágangurin varir (dagar, mánaðir, ár)
4) Títtleiki (hvussu ofta hevur barnið verið fyri kynsligum ágangi)
5) Aldurin á barninum

Niðanfyri er kynsligur ágangur flokkaður í trý eftir álvarsemi: (listin er ikki fullfíggjaður))

1. stig:

- Samlega, sum persónur hevur við barn (í móðurskeið ella endatarm).

- Munnmaking (oral sex), sum persónur hevur við barn ella munnmaking, sum barn hevur við persón.

2. stig:

- Kávan innan fyri klæðini uppi á kynsgøgnum og økjum nærhendis kynsgøgnum á barni, t.d. bróstum, maga, rumpu og lørum.
- Barn, sum er fingið at nema við ella káva uppi á einum vaksnum innan fyri klæðini, t.d. kynsgøgnum, økjum nærhendis kynsgøgnum, t.d. bróstum, maga, rumpu og lørum.

3. stig:

- Onkur vísir kynsgøgn síni fyri barni.
- Barn skal hyggja at, meðan kynsligar gerðir fara fram.
- Onkur hyggur at kynsgøgnunum á barni ella at barni, sum er lítið ílatið, t.d. tá ið barn fer á vesi, í bað ella liggur í seingini, ella at viðkomandi fær barnið at lata seg úr við tí fyri eyga at øsa seg ella barnið kynsliga.
- Trilvan og káv uttan á klæðunum uppi á kynsgøgnum og økjum nærhendis kynsgøgnunum á barni, t.d. bróstum, maga, rumpu og lørum.
- Barn er fingið til at nema við og káva uppi á vaksnum persóni uttan á klæðunum, uppi á kynsgøgnum og økjum nærhendis kynsgøgnunum, t.d. bróstum, maga, rumpu og lørum.
- Myndir verða tiknar av barni við tí fyri eyga at øsa onnur kynsliga.
- Pornotilfar, sum við vilja er havt nær barni ella verður víst barni, t.d. pornobløð, videobond við porno ella pornotilfari av netinum.
- Fúlt skemt, tá ið barn er hjá.
- Barn fær fúl SMS-boð.

## Heilsa ella lív hjá óføddum barni í vanda

### 1 Rúsdrekka ella onnur rúsevni í likami hjá barni

Hevur kvinna, ið gongur við barni, drukkið alkohol ella brúkt onnur rúsevni, eru evnini í mammuni í viðgongutíðini ella í barninum, eftir at tað er føtt. Dømi um rúsevni eru:

- Alkohol
- Kokain
- Heroin
- Amfetamin
- E-tablettir
- Marijuana
- Samansettur ella blandaður ólógligur heilivágur.

### 2 Heilsan hjá barninum í móðurlívi er í vanda orsakað av føðslutroti

Mamman hevur ikki matarlyst og megnar ikki at matføða seg og harvið ófødda barnið. Tað er lækni, ið skal staðfesta føðslutrot.

### 3 Heilsan hjá barni í móðurlívi er í vanda orsakað av, at maki bukar mammuna

Mamman fer ikki frá harðligum maka, hóast heilsa og menning barnsins í móðurlívi er í vanda, tí at makin bukar mammuna.

## 2. partur: Hættislig atferð hjá børnum

### 1 Barn rúsar seg

Illgruni er um, at barn drekkur rúsdrekka ella tekur rúsevni. Dømi um rúsevni onnur enn rúsdrekka eru lím-sniff, E-tablettir, kokain, LSD, amfetamin, marijuana, hassj, heroin. Talan kann eisini vera um heilivág, sum fæst í apotekum og verður tikin í stórum skamtum við tí endamáli at rúsa seg, t.d. sjóverkstablettir, magnyl, ritalin og tunglyndisheilivágur.

### 2 Barn setur egna heilsu og menning í vanda

Barn vísir tekin um at vilja gera sær sjálvum skaða, t.d. við at løsta seg sjálvt, beina fyri sær ella hevur álvarsligt etingarólag.

### 3 Misgerðir hjá barni

Dømi um misgerðir hjá barni:

- Barnið kemur ikki til hús ásettar tíðir
- Barnið gongur og biddar ella rýmir
- Barnið er upp í innbrotum, herverkum og stuldri

### 4 Barn fremur harðskap ella kynsligan ágang móti øðrum barni ella vaksnum persóni

Sí allýsingar og dømi undir "likamligur harðskapur" og "kynsligur ágangur".

### 5 Barn hevur trupulleikar í skúlanum og forsømir hann

Barn møtir illa upp í skúlanum, ger einki við skúlatingini ella hevur ikki neyðug amboð við í skúla, hóast foreldrini eftir førimuni royna at fáa barnið at røkja skúlan, sum tað eigur.